SKJAL 2

Umhvørvisstovan
Orka
Postboks 2048
FO-165 Argir

SEV

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail. Sev@sev.fo

Tórshavn, hin 8. apríl 2019

**Viðv. "Lýsing av umsókn um vindmyllulund" - lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, 29. mars 2019.**

Í omanfyri nevndu lýsing sigur Orka frá, at tey hava fingið eina umsókn frá einum umsøkjara um loyvi til eina 18 MW vindmyllulund á Gellingarkletti í Hoyvíkshaga í Suðurstreymoy. Víst verður til § 5, stk. 3 í elveitingarlógini. Sagt verður, at áhugaði kunnu koma við umsókn eftir nærri treytum. Hesar eru m.a., at umsøkjarar skulu kunnu vísa á eitt øki (við váttan frá jarðaeigara) at seta myllur á.

Hetta er ein nýggjur leistur í mun til leistin, sum varð nýttur í sambandi við, at SEV lat inn umsókn í 2012 um vindmyllulund í Húsahaga, og í mun til tað sum myndugleikin síðani hevur sagt seg vilja nýta í sambandi við slíka útbjóðing.

Hesin nýggi leisturin er eftir okkara tykki hvørki skilagóður ella í samsvari við:

1) Endamálinum við § 5, stk. 3 í elveitingarlógini,
2) Leistin, sum myndugleikin hevur nýtt í sambandi við slíkt vindútboð higartil, og
3) Mannagongdina og skipaða leistin sum aðrir myndugleikar innan friðing og byggiplanlegging, orkumyndugleikin og SEV hava verið samd um, sum verandi skilabest fyri samfelagið.

<u>Til 1) er at siga:</u>

Við uppskoti til løgtingslóg frá 7. mai 2012 (lm nr. 189/2011) skeyt landsstýris-maðurin upp, at broyta § 5, stk. 2 í táverandi elveitingarlóg soleiðis, at tað ikki longur skuldi vera eitt krav, at tað verður lýst alment eftir umsóknum, tá ið loyvi til elframleiðslu úr vindi verður veitt. Eftir ásetingini í uppskotinum skuldi tað verða upp til landsstýrismannin at meta um og gera av, hvørt tað er skilagott at lýsa eftir umsóknum, áðrenn eitt loyvi verður givið.

Í álitinum frá Vinnunevndini framgongur, at meirilutin (5 limir) setti fram broytingaruppskot, sum komið verður aftur til niðanfyri.

Minnilutin í Vinnunevndini (2 limir) førdi m.a. hetta fram:

*"Tá nýggja elveitingarlógin kom í 2007, var eitt høvuðsmál at skapa meira kapping og lata upp fyri fleiri elframleiðarum, fyrst og fremst á vindorkuøkinum, sum staðfest í § 5, stk. 2 í lógini.*

*Ógvuliga brádliga og uttan serliga gjøllar grundgevingar ynskir landsstýris-maðurin at taka ásetingina um útbjóðing av.*

*Landsstýrismaðurin hevur lagt løgtingsmál fyri løgtingið sum eitt skundmál nógvar vikur eftir seinasta framløgudag. Málið hevur ikki verið sent til hoyringar fyrr enn eftir, tað varð lagt fram. Einki er tó í viðmerkingunum ella í tí, sum landsstýrismaðurin hevur ført fram, sum bendir á, at málið hevur slíkan skund.*

*Minnilutin undrast stórliga, tí talan er um eina ógvuliga prinsipiella broyting, har farið verður burtur frá einari høvuðsáseting í elveitingarlógini, nevniliga, at øll vindorka skal bjóðast út.*

*Í lógini stendur:*

.....

*Um § 5, stk. 2 í lógini verður sagt: "Endamálið við hesi áseting er at geva øllum møguleika at bjóða seg fram at framleiða ravmagn úr hesi orkukeldu og á henda hátt fáa kapping á framleiðsluøkinum."*

.....

*Í sambandi við 1. viðgerð av málinum kom fram hugskot um at seta í lógina áseting um "open door", eins og gjørt er í oljulóggávuni. Hetta soleiðis, at tá fyritøka hevur søkt um at sleppa at gera eina vindorkuætlan, sum landsstýris-maðurin metir vera skilagóða at fremja, so verður latið upp fyri, at onnur kunnu bjóða uppá somu verkætlan innan fyri 60 dagar. Landsstýrismaðurin játtaði fyri nevndini at gera hesa broyting. Men tá broytingaruppskotið kom, stendur "kann" og ikki "skal".*

.....

*Hetta merkir sostatt, at landsstýrismaðurin ger fullkomiliga sum hann vil, og tað verður sostatt ikki eitt krav, at tryggjast skal opinleiki fyri møguligari kapping í sambandi við allar útbyggingar. Hetta er beinleiðis at undirgrava aðaltankan um kapping í elveitingarlógini fyri at fáa bíligastu og bestu útbyggingarnar, sum*

*geva lægst møguligan prís fyri brúkaran. Hesum tekur minnilutin als ikki undir við.*

*Hendan orðing má broytast til "skal", skal ásetingin geva nakra meining.*

....."

Meirilutin í Vinnunevndini førdi m.a. hetta fram:

".....

*Fyri at skapa fyritreytir fyri einari skjótari útbygging av vindorkuni, sum í dag er tann einasta orkuútbygging, sum krevur eina almenna útbjóðing, eru uttan iva fleiri møguleikar, har ein møguleiki er at avtaka verandi treyt um, at vindorku-útbygging skal bjóðast út alment, og í staðin lata upp fyri eini smidligari skipan av vindorkuútbyggingini við teirri treyt, at allir aktørar, sum bjóða seg fram til at framleiða vindorku, skulu í øllum førum taka atlit at veitingartrygdini.*

*Aftan á broytingina samsvarar hetta við ta skipan og tær treytir, sum vit hava í verandi kolvetnislóg.*

*Við grundarlagi í hesum setur meirilutin fram soljóðandi*

*Broytingaruppskot*

.....

*Sum nýtt § 5, stk. 3 verður sett:*

*"Stk. 3. Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, skal landsstýris-maðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhuga kunnu søkja um sama loyvi við einari freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð."*

.....

*Viðmerkingar*

.....

*Tá ið ein umsókn um loyvi at framleiða el úr vindorku kemur inn, skal lands-stýrismaðurin gera av, at onnur áhuga eisini kunnu søkja um loyvi á sama stað ella øðrum staði. Á hendan hátt ber til at fáa fleiri ymiskar umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og sostatt tryggja kapping og teir fyrimunir, sum kapping førir við sær.*
....."

Omanfyri nevnda broytingaruppskot frá meirilutanum varð samtykt, og hevur nevnda § 5, stk. 3 síðani verið óbroytt galdandi.

Av viðmerkingunum omanfyri sæst m.a., at onnur áhugað eisini skulu kunna søkja um loyvi á sama staði ella øðrum staði, við tí endamáli at kunna fáa fleiri umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og tryggja kapping. Sambært orðaljóðinum omanfyri og endamálinum við lógarásetingini skulu "onnur áhugað" bæði kunna søkja um loyvi á "sama stað" og á "øðrum staði", og tað er "tann áhugaði" og ikki landsstýrismaðurin, sum kann avgera, hvørt "tann áhugaði" velur at søkja um eitt loyvi á sama staði ella á øðrum staði. Tað er eisini soleiðis, at skipanin hevur verið higartil.

<u>Til 2) er at siga:</u>

Tá SEV hin 15. juni 2012 læt orkumyndugleikanum umsókn um loyvi til eina 11,7 MW vindmyllulund í Húsahaga í Suðurstreymoy, fekk SEV í brævi, dagfest 27. juni 2012, hetta svarið frá orkumyndugleikanum:

> <u>"Viðgerð av umsóknini</u>
>
> Sagt verður frá, at umsóknin verður viðgjørd eftir Elveitingarlógini, og harundir § 5, stk.3, sum sigur at:
>
> "*Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist uppá í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð.*" Sambært lógarviðmerkingunum til § 5, stk. 3, kann søkjast um loyvi á sama staði ella øðrum staði, sum søkt er um.
>
> Vísandi til omanfyri standandi ætlar Jarðfeingi at lýsa alment, at hendan umsóknin er móttikin frá SEV soleiðis, at onnur áhugað eisini kunnu søkja um loyvi á sama staði ella á øðrum staði við eini freist uppá í minsta lagi 60 dagar."

Útmeldingarnar frá orkumyndugleikanum hava síðani verið í samsvari við nevnda leist. T.v.s., at møgulig vindútboð ikki kundu koma uppá tal uttan so, at øll áhugað sleppa at bjóða við støði í uppseting av vindmyllum á tí staði, har ætlanin er at seta vindmyllur upp.

Sum Orka er kunnugt við, so hevur inntil nú ikki verið gjørligt hjá øðrum enn tí, sum hevur latið inn umsóknina um vindmyllulund í Hoyvíkshaganum at fingið loyvi til at seta upp vindmyllur í Hoyvíkshaganum í sambandi við møguligt vindútboð.

Um einki annað øki er klárt at seta upp vindmyllur á førir nýggi leisturin við sær, at tað ikki er møguligt hjá øðrum áhugaðum at luttaka í vindútboðnum, og at eingin kapping verður. Hetta er beinleiðis í stríð við tað, sum ein samd Vinnunevnd legði stóra áherðslu á, tá § 5, stk. 3 í elvetingarlógini varð samtykt, eins og at skilabesti útboðsháttturin, sum tryggjar ta bestu úrtøkuna av tilfeinginum í samfelagnum, verður sleptur.

Fyri tað fyrsta sæst Orka ikki at hava heimild til at fremja hendan nýggja leistin. Úrslitið av nýggja leistinum verður harumframt, at í staðin fyri lægri elprís hevur orkumyndugleikin hervið skapt tann vandan, at ein einstakur umsøkjari kann fáa ein nógv størri vinning burturúr sínari verkætlan enn tað, sum hevði verið møguligt, um øll áhuga høvdu møguleika at bjóða. Ein kostnaður sum elbrúkarin skal gjalda.

<u>Til 3) er at siga:</u>

Yvirfriðingarnevndin tók fyri nøkrum árum síðani stig til fundir við orkumyndugleikan, Búnaðarstovuna, SEV, umhvørvis- og byggimyndugleikar og fleiri fyri at tryggja, at ein skipaður leistur bleiv gjørdur fyri útboð at vindorku.

Yvirfriðingarnevndin ynskti at sleppa frá at taka støðu til fleiri ymiskar verkætlanir á ymiskum støðum, hvørja ferð eitt vindorkuútboð bleiv gjørt. Hetta bleiv mett at vera alt ov nógv arbeiðsorka at leggja á skipanina.

Tað var í hesari tilgongdini, at Jarðfeingi (nú Orka) og SEV blivu samd um at finna bestu økini í landinum til vindorkuútbyggingar og at skipa ein leist fyri útboðini.

Hetta hevði við sær, at Orka fekk til vega frágreiðing um útbyggingarmøguleikar, og at avtalað bleiv, hvar SEV skuldi seta upp vindmátimastrar, fyri at fáa til vega vinddáta til nýtslu fyri øll, sum vildu luttaka í útboðunum. Eisini var semja um, at SEV skuldi standa fyri at fremja umhvørvisárinsmetingarnar, sum kravdust til útboðini.

Samsvarandi hesum leisti hevur SEV m.a. eisini útvegað vinddáta og umhvørvisárinsmetingar at nýta í sambandi við Hoyvíkshagan.

-------- 0 --------

SEV hevur innrættað og skipað sítt virksemi eftir tí leisti, sum vindútboð higartil hava verið skipað, og hevur havt eina grundaða væntan um, at Orka fór at skipa fyri vindútboði í samsvari við nevnda leist.

Sum nevnt omanfyri boðar Orka í omanfyri nevndu lýsing av umsókn um vindmyllulund í Hoyvíkshaganum frá, at "*Fyri at ein umsókn um loyvi kann verða tikin til viðgerðar, er neyðugt at viðkomandi umsøkjari skjalprógvar atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar*". Hendan orðing forðar øðrum pørtum enn umsøkjaranum sjálvum í at bjóða á sama staði, tí umsøkjarin sum kunnugt ikki higartil hevur viljað givið øðrum møguleika til at luttaka í møguligum vindútboði á nevnda lendi í Hoyvíkshaganum. Hetta hóast talan er um jørð hjá landinum.

Tað er torført at skilja hví Orka bert umleið 3 vikur aftaná, at Búnaðarstovan boðaði frá, at umsóknin frá Orku um at fáa tillutað lendi í Hoyvíkshaganum til orkuframleiðslu ikki varð gingin á møti, og bert 9 yrkadagar eftir móttøku av umsóknini um vindmyllulund í Hoyvíkshaganum, avgjørdi at lýsa eftir umsøkjarum við áður nevndu treyt um, at umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar.

Spurningurin er eitt nú, hvat Orka hevur gjørt fyri at kanna, hvørt onnur áhugað yvirhøvur hava møguleika at luttaka í vindútboðnum við nevndu treyt og harnæst, hvat Orka hevur gjørt fyri at fáa lýst møguleikan at bjóða annað øki út í staðin fyri Hoyvíkshagan, har øll áhugað kundu bjóða.

Í hesum sambandi skal eisini havast í huga, at Orka hevur sett freistina at søkja til 77 dagar, sum er lítið meira enn minst møguliga freistin á 60 dagar.

Heitt verður við hesum á Orku um:

1. at grundgeva fyri avgerðini, hareftir tað nú verður sett sum treyt, at "*Fyri at ein umsókn um loyvi kann verða tikin til viðgerðar, er neyðugt at viðkomandi umsøkjari skjalprógvar atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar*";

2. at greiða frá heimildini fyri avgerðini;

3. at greiða frá, um Orka hevur kannað, hvørt onnur áhugað yvirhøvur hava møguleika at luttaka í umrødda vindútboðnum við omanfyri nevndu treyt;

4. at greiða frá, hvør avleiðingin verður fyri útbjóðingarleistin framyvir, umframt fyri mannagongdina og skipaða leistinum, sum semja higartil hevur verið um, at Orka nú hevur sett sum treyt í lýsing um vindmyllulund í Hoyvíkshaganum, at viðkomandi umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar, hóast Orka er vitandi um, at eingin annar enn umsøkjarin sjálvur fær atgongd til viðkomandi lendi, og

5. at greiða frá, um Orka hevur gjørt nakað fyri at fáa lýst møguleikan fyri at bjóða annað øki út í staðin fyri Hoyvíkshagan, har øll áhugað kunnu bjóða.

Somuleiðis verður biðið um innlit í øll skjølini, sum Orka hevur í málinum viðvíkjandi avgerðini um, at tað nú skal setast sum treyt fyri at kunna verða við í einum útboði, at viðkomandi hevur atgongd til økið, sum er fevnt at útboðnum.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV

John Zachariassen,
nevndarformaður

/

Hákun Djurhuus,
stjóri

./. Avrit er sent Heilsu- og innlendismálaráðnum og Kommunufelagnum.

umhvørvisstovan

SEV
Tórshavn

Att.: John Zachariassen, nevndarformaður
Hákun Djurhuus, stjóri

Argir, 17. apríl 2019
Málsnr.: 19/00349
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ari Johanneson

Viðvíkjandi lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku

Víst verður til skriv tykkara, dagfest 8. apríl 2019 viðv. omanfyri nevnda.

Lýsingin/útboðið er grundað á umsókn frá Sp/f Vindrøkt um loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum.

Í nevnda skrivi frá SEV verður heitt á Orku um at greiða frá og grundgeva fyri niðanfyri nevndu spurningum:

1. At grundgeva fyri avgerðini, hareftir tað nú verður sett sum treyt, at "Fyri at ein umsókn um loyvi kann verða tikin til viðgerðar, er neyðugt at viðkomandi umsøkjari skjalprógvar atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar".
2. At greiða frá heimildini fyri avgerðini.
3. At greiða frá, um Orka hevur kannað, hvørt onnur áhugað yvirhøvur hava møguleika at luttaka í umrødda vindútboðnum við omanfyri nevndu treyt.
4. At greiða frá, hvør avleiðingin verður fyri útbjóðingarleistin framyvir, umframt fyri mannagongdina og skipaða leistinum, sum semja higartil hevur verið um, at Orka nú hevur sett sum treyt í lýsing um vindmyllulund í Hoyvíkshaganum, at viðkomandi umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar, hóast Orka er vitandi um, at eingin annar enn umsøkjarin sjálvur fær atgongd til viðkomandi lendi.
5. At greiða frá, um Orka hevur gjørt nakað fyri at fáa lýst møguleikan fyri at bjóða annað øki út í staðin fyri Hoyvíkshagan, har øll áhugað kunnu bjóða.

Eisini biður SEV um innlit í øll skjøl, sum Orka hevur í málinum viðvíkjandi avgerðini um, at tað nú skal setast sum treyt fyri at kunna verða við í einum útboði, at viðkomandi hevur atgongd til økið, sum er fevnt at útboðnum.

umhvørvisstovan

Niðanfyri eru svar og viðmerkingar til nevndu spurningar:

**Viðv. 1.**
Treytin um, at umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar, hevur verið galdandi alla tíðina síðani farið varð undir at bjóða loyvi út til elframleiðslu úr vindorku, og ongin nýggj avgerð er tikin av Orku í so máta.
Útboð av loyvi til elframleiðslu úr vindorku hava higartil verið í:

- 2010 í Neshaga ella á øðrum hóskandi staði
- 2012 í Húsahaga ella á ørðum hóskandi staði
- 2018 í Porkeri (Orka hevur í samráð við SEV fyrireikað økið)
- 2018 á Eiði (Orka hevur í samráð við SEV fyrireikað økið)
- 2019 grundað á sjálvbodna umsókn frá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum.

Viðvíkjandi váttan frá jarðaeigara er at siga, at í lýsingingi frá juli 2012 stóð :
*"Í sambandi við umsóknir um loyvi, sambært omanfyri nevnda, er neyðugt, at umsøkjarin kann vísa á eitt øki (við váttan frá jarðaeigara) har vindmyllurnar kunnu setast..."*

Í seinastu lýsingini frá apríl 2019 stendur:
*"Tá ið søkt verður um loyvi, sambært omanfyri nevnda, er neyðugt, at umsøkjarin kann vísa á eitt øki (við váttan frá jarðaeigara), har vindmyllurnar kunnu staðsetast...".*

Til kunningar er hjálagt avrit av báðum lýsingunum frá ávikavist 2012 og 2019.

Sostatt er ongin broyting í grundleggjandi treytunum um atgongd til lendi við váttan frá jarðaeigara.

Í 2012, sum var fyrsta útboðið, har umsøkjarar kundu søkja sjálvbodnir, varð váttan fingin frá viðkomandi jarðaeigara um atgongd til lendi.

Í útboðunum í Húsahaga og í Neshaga var møguligt hjá einum og hvørjum at søkja um loyvi. Umsøkjarar kundu eisini søkja á øðrum hóskandi støðum, tó treytað av, at teir sjálvir útvegaðu váttan frá viðkomandi jarðareigara.

Viðvíkjandi "open door" umsóknini í 2019 frá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum er annars at siga, at Orka sum kunnugt í longri tíð hevur arbeitt við at útvega atgongd til lendi í Hoyvíkshaganum við tí fyri eyga at lýsa eftir umsøkjarum, sambært § 5, stk. 2 í elveitingarlógini. Tað eydnaðist tó ikki Orku at at fáa atgongd til lendi.

**Viðv. 2.** Heimildin at lýsa er í § 5, stk. 3 í elveitingarlógini sum sigur:

*"Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin*

*eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð."*

**Viðv. 3.** Í hesum føri er tað upp til umsøkjararnar sjálvar at útvega sær atgongd til hóskandi lendi, sí eisini pkt. 1.

**Viðv. 4.** Sambært elveitingarlógini, kann lýsast eftir loyvum til elframleiðslu úr vindorku uppá tveir mátar: 1) myndugleikin kann bjóða loyvi út, 2) umsøkjarar kunnu sjálvbodnir søkja um loyvi.

Orka fer framhaldandi at arbeiða fyri at bjóða út loyvi til elframleiðslu úr vindorku eftir tí leisti, sum arbeitt hevur verið eftir seinastu árini. T.v.s. hóskandi økir til staðseting av vindmuyllu-lundum verða fyrireikað til útboð í samráð við viðkomandi myndugleikar, harundir SEV og viðkomandi eigarar av lendi.

Hin møguleikin sambært elveitingarlógini verður sjálvandi eisini til staðar, har umsøkjarar kunnu søkja sjálvbodnir. Í teimum førunum mugu neyðugu treytirnar verða loknar fyri eitt møguligt seinni útboð.

Ongar ítøkiligar ætlanir eru sostatt um at gera broytingar í tí útbjóðingarleisti, sum higartil hevur verið arbeitt eftir, hóast neyðugar tillagingar sjálvsagt verða gjørdar, í tann mun tørvur mátti verið fyri tí.

Hesin leistur, at orka í samráð við SEV fyrireikar útboð, hevur verið brúktur á Eiði, har freistin at søkja er 1. august 2019, og hesin leistur varð eisini brúktur í útboðnum av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Porkeri, har avgerð nú er tikin um, hvør fær loyvi í Porkeri. Somuleiðis verður hesin leistur brúktur í sambandi við verandi fyrireikingar av útboði í Sandoynni.

**Viðv. 5**
Í sambandi við ítøkiligu lýsingina um loyvi til elframleiðslu úr vindorku grundað á sjálvbodnu umsóknina frá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum, er lagt upp til, at møguligir umsøkjarar sjálvir útvega váttan um atgongd til lendi, antin í Hoyvíkshaganum ella á øðrum hóskandi lendi.

---

Viðvíkjandi spurninginum um innlit í øll skjøl, sum Orka hevur í málinum viðvíkjandi avgerðini um váttan frá jarðaeigara, verður sagt frá, at onki mál finst, við nevnda heiti. Sum omanfyri

nevnt er heldur ikki tikin nøkur nýggj avgerð í hesum sambandi, tí hendan treyt hevur alla tíðina verið galdandi, heilt síðani fyrsta útboðið, ið varð lýst í 2010.

Eru spurningar ella ivamál eru tit vælkomin at venda aftur til okkara.

Vinarliga

Petur Nielsen
Stjóri

Ári Johanneson
ráðgevi

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

Umhvørvisstovan
Orka
Psotboks 2048

FO-165 Argir

**Elfelagið SEV**
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

Att.: Petur Nielsen, stjóri / Ari Johanneson, ráðgevi.

Tórshavn, hin 9. mai 2019

**Viðv. tykkara málsnr. 19/00349: Lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku.**

Skrivið frá Orku, dagfest 17. apríl 2019, gevur høvi til hesar viðmerkingar:

Higartil hava fylgjandi útboð verið:

- Neshagi 2010
- Húsahagi 2012
- Porkeri 2018
- Eiði 2018 (lýst 1. juli 2018 við umsóknarfreist 1. august 2019)

Í øllum útboðum, sum higartil hava verið, hevur verið møguligt hjá einum og hvørjum at søkja um loyvi á sama staði, sum tað sambært útboðnum er ætlanin at seta upp vindmyllur.

Útboðið í Húsahaga í 2012 var fyrsta útboðið sambært § 5, stk. 3 í elveitingar-lógini, t.v.s., har umsókn um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku var latin inn, uttan at alment var lýst eftir umsóknum frammanundan, eins og Sp/f Vindrøkt nú hevur gjørt í Hoyvíkshaganum.

Í útboðunum í Húsahaga og í Neshaga kundu umsøkjarar, umframt at søkja um loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Húsahaga ella Neshaga, eisini søkja um loyvi á øðrum hóskandi støðum, tó treytað av at teir sjálvir útvegaðu váttan frá jarðareigara.

Treytin um at umsøkjarin sjálvur skal kunna vísa á eitt øki (við váttan frá jarðareigara), har vindmyllurnar kunnu setast, hevur tí inntil nú, bert verið galdandi fyri umsóknir á øðrum hóskandi støðum, men ikki fyri umsóknir á tí staði, har vindmyllur sambært útboðnum ætlandi skulu setast upp.

Ein grundleggjandi munur á lýsta útboðnum í Hoyvíkshaganum (ella á øðrum hóskandi staði) og á teimum undanfarnu útboðunum er sostatt, at útboðið er lýst, hóast Orka veit, at aðrir umsøkjarar, sum útgangsstøði ikki hava møguleika at søkja um loyvi í Hoyvíkshaganum. Afturat hesum kemur so, sum nærri umrøtt niðanfyri, at Orka hóast hetta einki hevur gjørt fyri at kanna, hvørt tað yvirhøvur er møguligt hjá øðrum umsøkjarum at søkja á øðrum hóskandi staði.

Grundað á sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum, hevur Orka sostatt lýst eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum (ella á øðrum hóskandi staði), vitandi um, at tað mest sannlíkt, hvørki er møguligt hjá øðrum umsøkjarum at koma við einari umsókn í Hoyvíkshaganum ella við einari kappingarførari umsókn á øðrum staði.

Ásetingin í § 5, stk. 3, í elveitingarlógini er soljóðandi:
""*Stk. 3. Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, <u>og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar</u> og umsóknin <u>tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd</u>, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhuga kunnu søkja um sama loyvi við einari freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst var."* (okkara undirstriking).

Upp á spurningin um, hvørt Orka hevur kannað, um aðrir umsøkjarar yvirhøvur hava møguleika at luttaka í vindútboðnum, sum er lýst við støði í sjálvbodnari umsókn um loyvi til eina 18 MW vindmyllulund í Hoyvíkshaganum, svarar Orka stutt, at í hesum føri er tað upp til umsøkjararnar sjálvar at útvega sær atgongd til hóskandi lendi. Eftir hesum at døma hevur Orka sostatt einki gjørt fyri at kanna hesi viðurskifti.

Upp á spurningin frá SEV um, hvørt Orka hevur gjørt nakað fyri at fáa lýst møguleikan fyri at bjóðað annað øki út í staðin fyri Hoyvíkshagan, har øll áhugað kunnu bjóða, svarar Orka somuleiðis stutt, at í sambandi við ítøkiligu lýsingina um loyvi til elframleiðslu úr vindorku grundað á sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum, er lagt upp til at møguligir umsøkjarar sjálvir útvega váttan um atgongd til lendi, antin í Hoyvíkshaganum ella á øðrum hóskandi lendi. Eftir hesum at døma hevur Orka sostatt heldur ikki kanna hesi viðurskiftini nærri.

Upp á spurningin um, hvør avleiðingin verður fyri útbjóðingarleistin frameftir, at møguligur umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar í Hoyvíkshaganum, hóast Orka er vitandi um, at eingin annar enn umsøkjarin sjálvur hevur atgongd til viðkomandi lendi, svarar Orka, at Orka fer framhaldandi at arbeiða fyri at bjóða út loyvi til elframleiðslu úr vindorku eftir tí leisti, sum arbeitt hevur verið eftir seinastu árini. Eisini sigur Orka, at hin møguleikin sambært elveitingarlógini verður sjálvandi eisini tilstaðar, har

umsøkjarar kunnu søkja sjálvbodnir. Í hesum sambandi sigur Orka, at *"Í teimum førum mugu neyðugu treytirnar verða loknar fyri eitt møguligt seinni útboð."* Tað er ógreitt, hvat hetta merkir. Heitt verður tí á Orku um at greiða nærri frá hesum.

Víðari sigur Orka, at leisturin, hereftir Orka í samráð við SEV fyrireikar útboð, sum hevur verið brúktur á Eiði, somuleiðis verður brúktur í sambandi við verandi fyrireikingar av útboði á Sandoynni. Í hesum sambandi skal verða víst á, at Magn nýliga hevur úttalað í fjølmiðlunum, at Magn er í fer við at gera avtalu við jarðaeigarar á einum av teimum støðunum, har ætlanin er at skipa fyri útboð av loyvi til elframleiðslu úr vindorku.

Vísandi hertil er spurningurin, hvussu ein møgulig sjálvboðin umsókn um elframleiðslu úr vindorku, t.d. á Sandoynni ella aðrastaðni, sambært § 5, stk. 3 í elveitingarlógini verður viðgjørd, um ein slík umsókn aftur verður latin inn av umsøkjara, sum hevur gjørt avtalu við viðkomandi jarðaeigara/festara um lendi til at seta vindmyllur á við tí ætlan, at eingin annar skal hava møguleika at søkja á staðnum, sum umsóknin fevnir um.

Viðvíkjandi heimildini at lýsa eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku við tí treyt, at umsøkjari skal skjalprógva atgongd til viðkomandi lendi til vindmyllurnar, endurgevur Orka einans orðaljóðið í § 5, stk. 3 í elveitingarlógini, sum er endurgivin omanfyri. Orka kemur sostatt ikki við nakrari frágreiðing hesum viðvíkjandi.

Yvirskipað skal havast í huga, at tað í Føroyum bert verður talan um eitt avmarkað tal av loyvum til elframleiðslu burturúr vindorku, sum yvirhøvur koma uppá tal afturat teimum, sum longu eru givin.

Sum greitt frá í skrivi okkara frá 8. apríl 2019 sæst av viðmerkingunum til § 5 í elveitingarlógini, at onnur áhugað eisini skulu kunna søkja um loyvi á sama staði ella øðrum staði, við tí endamáli at tað eru fleiri umsøkjarar til eitt ávíst loyvi, og tað harvið verður tryggjað kapping. Sambært orðaljóðinum á viðmerkingunum og endamálinum við lógarásetingini er tað sostatt "tann áhugaði" umsøkjarin og ikki landsstýrismaðurin, sum kann avgera, hvørt "tann áhugaði" velur at søkja um eitt loyvi á sama staði ella á øðrum staði. Tað er eisini soleiðis, skipanin hevur verið higartil.

Sum eisini greitt frá í skrivi okkara frá 8. apríl 2019 hava útmeldingarnar frá Orku síðani vindútboðið í Húsahaga í 2012 verið, at møgulig vindútboð ikki kundu koma uppá tal uttan so, at øll áhugað sleppa at bjóða við støði í uppseting av vindmyllum á tí staði, har ætlanin sambært útboðnum er at seta vindmyllur upp.

Orka er kunnugt við, at tað inntil nú ikki hevur verið gjørligt hjá øðrum enn umsøkjaranum Sp/f Vindrøkt at fingið loyvi til at seta upp vindmyllur í

Hoyvíkshaganum. Um einki annað øki er klárt at seta upp vindmyllur á, ella einki annað eins gott øki og Hoyvíkshagin er tøkt, førir hetta við sær, at eingin kapping verður. Hetta er beinleiðis í stríð við elveitingarlógina og tað, sum ein samd Vinnunevnd legði stóra áherðslu á, tá § 5, stk. 3 í elveitingarlógini varð samtykt, eins og tað er í stríð við skilabesta útboðsháttin, sum tryggjar ta bestu úttøkuna av tilfeinginum í samfelagnum.

Nógv týðir sostatt á, at Orka í sínari viðgerð av spurninginum um, hvørt "*umstøðurnar og umsóknin tala fyri*", at umsóknin frá Sp/f Vindrøkt um loyvi til elframleiðslu í Hoyvíkshaganum úr vindorku átti at verða viðgjørd, als ikki hevur tikið atlit at, umstøðurnar í málinum hava við sær, at tað mest sannlíkt ikki verður nøkur kapping.

Um Orka góðtekur, at sjálvboðin umsókn um loyvi til at seta vindmyllur upp til elframleiðslu á ávísum øki, sum (ætlandi) fevnir um eina eksklusiva avtalu við jarðaeigara/festara um viðkomandi øki, kann vera grundarlag fyri lýsing eftir umsøkjarum, er Orka beinleiðis orsøk til, at eingin kapping verður.

Her skal eisini havast í huga, at sambært tí í skrivi okkara, dagfest 8. apríl 2019 skipaða leistinum, sum higartil hevur verið galdandi, hevur tað verið Orka, sum hevur skula fingið til vega lendi at seta vindmyllur á. Eitt er, at tað inntil nú ikki hevur verið møguligt hjá øðrum møguligum umsøkjarum at sloppið fram at í Hoyvíkshaganum. Annað er, at Orka hevur heldur einki gjørt fyri at kanna, hvørt aðrir umsøkjarar kunnu sleppa fram at øðrum økjum soleiðis, at umsóknir um ikki annað kundu verið latnar inn við aðrari staðseting.

Aftaná at lýst er eftir umsóknum til elframleiðslu grundað á sjálvbodnu umsóknini frá Sp/f Vindrøkt um at seta vindmyllur upp í Hoyvíkshaganum, hevur Orka í fjølmiðlunum greitt frá, at Orka er ført fyri at meta um, hvør prísur er kappingarførur m.a. út frá vindútboðnum, sum hevur verið í Suðuroy og øðrum vindútboðum.

Í fyrsta lagi ger tað, at Orka heldur seg kunna meta um prísin ikki, at Orka kann velja at síggja burtur frá fyritreytini í elvetingarlógini um, at í sambandi við útboð skal verða kapping.

Í øðrum lagi er tað ikki rætt, at Orka kann meta um, hvør prísur er kappingarførur út frá m.a. vindútboðnum í Suðuroy ella øðrum vindútboðum.

Viðurskiftini í sambandi við vindútboðið í Suðuroy kunnu ikki samanberast við viðurskiftini í sambandi við sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum. Eitt nú fevnir umsóknin í Hoyvíkshaganum um ein mátt á 18 MW og 6 vindmyllur á 3 MW, meðan útboðið í Suðuroy fevndi um 6 MW, og tilboðið frá SEV í Suðuroy fevndi um 7 vindmyllur á 900 kW. Harumframt er t.d. lendisarbeiðið eisini sera ymiskt.

Vindútboðið í Húsahaga (ella øðrum hóskandi øki) í 2012 var tað seinasta vindútboðið áðrenn vindútboðið í Suðuroy í 2018. Heldur ikki viðurskiftini, sum vóru galdandi í sambandi við tað útboðið, kunnu samanberast við viðurskiftini í sambandi við sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum. Vindútboðið í Húsahaga (ella øðrum hóskandi øki) fevndi um ein mátt á 11,7 MW, meðan tilboðið hjá SEV fevndi um 13 vindmyllur á 900 kW.

Sum útgangsstøði ber ikki til at ganga út frá, at tilboðsprísir í sambandi við eitt útboð kunnu leggjast til grund í sambandi við eitt annað útboð. Fleiri viðurskifti kunnu gera, at tilboðsprísir broytast. Ikki minst støddin á útbjóðaða máttinum og støddin á vindmyllunum hava ávirkan á tilboðsprísin. Harumframt er ymiskt, hvørji tilboð umsøkjarar fáa frá vindmylluleverandørunum.

Í hesum sambandi kann vísast til avgerðina hjá Vinnukærunevndina frá 27. mai 2013 (j.nr. 13/00019, 13/000/20), tá Sp/f Vindrøkt kærdi avgerðina hjá Jarðfeingi (nú Orka) um, at Jarðfeingi hevði givið SEV loyvi at framleiða el úr vindorku í Húsahaga. Í avgerðini hjá Vinnukærunevndini verður m.a. sagt, at:

".....
*SEV hevur fingið eitt betri tilboð frá leverandørinum, sum gevur SEV ein munandi lægri íløgukostnað, og hetta er høvuðsorsøkin til prísmunin millum partamar.*
....."

"*Samanumtikið kann viðmerkjast, at .....
Metingin av SEV og Sp/f Vindrøkt er sera jøvn burtursæð frá einum metingarstøði, sum er prísurin. Her er SEV greitt betri enn Sp/f Vindrøkt, og orsøkin er einamest at finna í tí lægra íløgukostnaðinum hjá SEV, sum aftur er grundaður á tilboðið frá leverandørinum. Við hesum viðmerkingum verður avgerðin hjá Jarðfeingi staðfest.*" (okkara undirstriking).

Í avgerðini hjá Vinnukærunevndini er eisini upplýst, at tilboðið frá SEV var upp á 31,6 oyru/kWh, meðan tilboðið frá Sp/f Vindrøkt var uppá 37,5 oyru/kWh ella umleið 15,7% hægri. Eisini verður upplýst, at sambært framroknaðu rakstrar-tølunum fyri feløgini merkir prísmunurin í krónum, at brúkarin skal gjalda útvið 37 mió. kr. minni til SEV í 15 ára tíðarskeiðnum, enn brúkarin hevði skula goldið, um tikið var av tilboðnum hjá Sp/f Vindrøkt.

Viðvíkjandi týdninginum av at fáa so lágan prís sum gjørligt, verður víst til avgerðina hjá Vinnukærunevndini frá 13. februar 2012 (j.nr. 11/00157), tá Sp/f Vindrøkt kærdi avgerðina hjá Jarðfeingi (nú Orka) um, at Jarðfeingi hevði givið SEV loyvi til at framleiða el úr vindorku í Neshaga. Í nevndu avgerð hjá Vinnukærunevndini verður m.a. sagt, at:

*"Viðvíkjandi prísinum sum metingarstøði so framgongur tað beinleiðis av viðmerkingunum til lógaruppskotið, at stórur dentur skal leggjast á prísin. Tað framgongur av lógaruppskotinum, at prísurin ikki skal vera hægri enn neyðugt, og hartil verður hetta endamálið nevnt at vera eitt aðalendamál við lógini. Spurnartekin kann setast við, um tað er nóg mikið at vekta prísin við 40% vísandi til tann týdning, sum prísurin sambært lógini og lógarviðmerkingunum hevur. Hetta kann tó ikki metast at hava týdning í mun til avgerðina hjá Jarðfeingi í hesum føri, tí ein hægri vekting av prísinum hevði ikki broytt tað støðu, at grundarlag var fyri at veita framleiðsluloyvi til SEV."* (okkara undirstriking).

Eitt er, at Orka sambært elveitingarlógini ikki hevur heimild at gera av, at Orka skal meta um, hvørt ein sjálvboðin umsøkjari bjóðar ein kappingarføran prís fyri eitt loyvi til elframleiðslu úr vindi í Hoyvíkshaganum, ístaðin fyri at skipa so fyri, at lægsti prísurin verður staðfestur í kapping í millum fleiri umsøkjarar.

Eitt annað er, at tað als ikki ber til hjá Orku at gera eina slíka meting longu av tí orsøk, at Orka hvørki hevur kunnleika til, hvørjir umsøkjarar luttaka í einum møguligum útboði, ella hvørji tilboð møguligir umsøkjarar kundu útvega frá einum og sama leverandøri ella frá fleiri ymiskum levarandørum av vindmyllum. At tað ikki ber til hjá Orku at gera nevndu meting sæst eisini greitt av omanfyri fyrr nevndu avgerðini hjá Vinnukærunevndini, har staðfest verður, at høvuðsorsøkin til prísmunin á meira enn 15% í tilboðunum frá SEV og Sp/f Vindrøkt í sambandi við Húsahagaútboðið í 2012 var, at SEV fekk eitt betri tilboð frá leverandørinum.

Vísandi til tað omanfyri nevnda verður heitt á Orku um at grundgeva fyri avgerðini um, at umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt skuldi viðgerast herundir upplýsa hvørjar "*umstøðurnar*" eru, sum eftir metingini hjá Orku tala fyri hesum, og fyri at lýst skal vera eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum ella á øðrum hóskandi staði við støði í nevndu umsókn, hóast tað inntil nú ikki hevur verið gjørligt hjá øðrum enn umsøkjaranum sjálvum at fingið loyvi at seta upp vindmyllur í Hoyvíkshaganum, og hóast Orka ikki hevur kannað, hvørt tað er møguligt at lata inn umsókn við aðrari staðseting.

Fyri at fáa viðurskiftini upplýst verður eisini heitt á Orku um at at geva SEV innlit í:

1) Øll skjøl í sambandi við at Orka hevur roynt at fingið atgongd til lendi í Hoyvíkshaganum herundir samskifti við Búnaðarstovuna, festaran í Hoyvíkshaganum, samskifti við onnur hesum viðvíkjandi, samskifti viðvíkjandi kæru av avgerð hjá Búnaðarstovuni at afturkalla tilsøgn til festaran v.m.

2) Øll skjøl viðvíkjandi framferðarhátti/mannagongd í sambandi við lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku herundir frágreiðingar, løgfrøðilig upprit, onnur upprit, samskifti við onnur, fundarfrágreiðingar v.m.

3) Øll skjøl í sambandi við útboðið í Hoyvíkshaganum, herundir frágreiðingar, løgfrøðilig upprit, onnur upprit, samskifti við onnur, fundarfrágreiðingar v.m.

Sum boðað frá í skrivi okkara frá 8. apríl 2019 hevur SEV innrættað og skipað sítt virksemi eftir tí leisti, sum vindútboðini higartil hava verið skipað eftir, og SEV hevur havt eina grundaða væntan um, at Orka í framtíðini fór at skipa vindútboðini eftir sama leisti.

Avrátt var, at Orka skuldi útvega lendi á øllum støðunum, har áhugavert er at seta upp vindmyllur soleiðis, at øll kunna hava møguleika at luttaka í útboðunum av tí avmarkaða tali av loyvum til elframleiðslu, sum talan verður um. Í hesum sambandi hevur ætlanin verið, at myndugleikarnir skuldu skipa fyri, at ein kunngerð var gjørd við treytum fyri útvegan av almennari jørð til vindorkuútboð.

Harumframt hava øll havt eina grundaða væntan um, at Orka ikki fór undir at viðgera og lýsa nakra sjálvbodna umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku uttan, at øll høvdu møguleika at bjóða seg fram á tí staði, har ætlanin er at seta vindmyllur upp, umframt á øðrum hóskandi øki.

SEV hevur soleiðis eitt nú eisini útflýggja tær vindkanningar og byrjandi árinskanningar, sum eru grundarlag undir umsóknini hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum við tí grundaðu væntan, at øll fóru at hava møguleika at luttaka í møguligum útboði av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum.

Tá tað hevur víst seg, at Orka ikki ætlar at skipa útboðið av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum soleiðis, at øll hava møguleika at luttaka, hevur SEV kent seg noytt til sjálvt at venda sær til Búnaðarstovuna fyri at royna at fáa atgongd til lendið í Hoyvíkshaganum í sambandi við, at SEV ætlar at lata Orku umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum.

Harumframt er SEV eisini farið undir at kanna, hvørt møguligt er at lata inn umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku á øðrum staði enn í Hoyvíkshaganum. Greitt er tó, at tað kann gerast torført at fáa nakað annað stað at gerast eitt kappingarført alternativ til Hoyvíkshagan. Ikki minst við tí stuttu umsóknarfreistini, sum Orka hevur ásett.

Vísandi til at avgerðin hjá Orku um at viðgera umrøddu sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt um loyvi til at seta vindmyllur upp í Hoyvíkshaganum má metast at vera í stríð við elveitingarlógina, og at SEV hevur tikið omanfyri nevndu stig, verður heitt á Orku um

- í fyrsta lagi at taka upp aftur viðgerðina av spurninginum um, hvørt sjálvbodna umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt eigur at verða viðgjørd sambært § 5, stk. 3 í elveitingarlógini undir verandi umstøðum og samstundis taka aftur lýsingina eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku, sum er grundað á áður nevndu sjálvbodnu umsókn, og
- í øðrum lagi at útseta settu freistina fyri innlating av tilboði í nakrar mánaðar soleiðis, at møguleikin hjá SEV at fáa greiðu á omanfyri nevndu viðurskiftum gerst betri.

Gjørt verður vart við, at SEV sum nevnt ikki dugir at síggja, at Orka hevur heimild til at fremja lýsta útboðið, sum er grundað á sjálvbodnu umsóknina viðvíkjandi Hoyvíkshaganum. Í hesum sambandi verður eisini víst til skrivið hjá SEV til Orku, dagfest 8. apríl 2019, og svarið frá Orku, dagfest 17. apríl 2019. SEV fyriheldur sær tí øll rættindi í sambandi við hetta mál, herundir at royna málið rættsliga, um tað ikki vísir seg at verða møguligt at finna eina skilagóða loysn á málinum.

Undir øllum umstøðum er talan um ein framferðarhátt hjá Orku, sum elvir til nógv ivamál og ósemjur, sum sleppast kann undan, um farið verður fram á ein skilagóðan hátt.

./. Til kunningar eru viðheft skriv, sum SEV hevur sent ávikavist til Heilsu- og innlendismálaráðið dagfest 9. mai. 2019, Fiskimálaráðið dagfest 9. mai 2019 og Búnaðarstovuna dagfest 7. mai 2019.

Viðmerkjast skal, at avrit av hesum skrivi við tilhoyrandi skrivum er sent Kommunufelagnum til kunningar.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV

Jóhn Zachariassen,
nevndarformaður

/

Hákun Djurhuus,
stjóri

Umhvørvisstovan
Orka
Postboks 2048
FO-165 Argir

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

Att.: Petur Nielsen, stjóri/Ari Johanneson, ráðgevi

Tórshavn, hin 22. mai 2019

sent
22-5-2019 13:26

**Viðv. tykkara málnr. 19/00349: Lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku.**

Víst verður til bræv okkara frá 9. mai 2019 og til fund 16. mai 2019 í øðrum sambandi, har innihaldið í brævinum eisini partvíst varð umrøtt.

Í brævinum frá 9. mai 2019 heittu vit m.a. á Orku um:

- <u>í fyrsta lagi</u> at taka upp aftur viðgerðina av spurninginum um, hvørt sjálvbodna umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt eigur at verða viðgjørd sambært § 5, stk. 3 í elveitingarlógini undir verandi umstøðum og samstundis taka aftur lýsingina eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku, sum er grundað á áður nevndu sjálvbodnu umsókn, og
- <u>í øðrum lagi</u> at útseta settu freistina fyri at lata inn tilboð í nakrar mánaðar soleiðis, at møguleikin at fáa greiðu á teimum í nevnda brævi okkara frá 9. mai 2019 umrøddu viðurskiftum gerst betri.

Tá tað higartil hevur víst seg, at Orka ikki ætlar at skipa útboðið av loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum soleiðis, at øll hava møguleika at luttaka, hevur SEV, sum greitt frá í brævi okkara frá 9. mai 2019, kent seg noytt til sjálvt at venda sær til Búnaðarstovuna fyri at royna at fáa atgongd til lendið í Hoyvíkshaganum í sambandi við, at SEV ætlar at lata Orku umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum.

Harumframt er SEV sum nevnt eisini farið undir at kanna, hvørt møguligt er at lata inn umsókn um loyvi til elframleiðslu á øðrum staði enn í Hoyvíkshaganum. Tað kann tó gerast torført at fáa nakað annað stað at gerast eitt kappingarført alternativ til Hoyvíkshagan. Ikki minst við tí stuttu umsóknarfreist, sum Orka hevur ásett.

Hósdagin 16. mai 2019 var fundur millum Orku og SEV, har Ari Johanneson og Meinhard Eliasen luttóku fyri Orku, meðan John Zachariassen, Hákun Djurhuus, Heri Mortensen, Bogi Bendtsen, Terji Nielsen og Jón Nielsen (partvís) luttóku fyri SEV.

Á hesum fundi førdi SEV m.a. fram, at tað eru tvær kombinatiónir av økjum, har tað er møguligt hjá myndugleikanum at gera eitt § 5, stk. 2 útboð uppá 18 MW:

a. Bøllureyn í Flatnahaga (12 MW) og Hoyvíkshagi vestanfyri Oyggjarvegin (6 MW)
b. Bøllureyn í Flatnahaga (12 MW) og Eiði (6MW)

Um nevndu trý økini kann sigast, at Tórshavnar kommuna er eigari av Flatnahaga, at økið á Eiði er tann parturin av økinum, arbeitt hevur verið við í sambandi við § 5, stk. 2 útboðið á Eiði, sum liggur norðan fyri vegin, og sum er til avlops, og at økið í Hoyvíkshaganum er vestanfyri Oyggjarvegin og okkum kunnugt ikki fevnt av nakrari binding.

Sum áður sagt, so heitir SEV <u>í fyrsta lagi</u> á Orku um at steðga útboðnum í Hoyvíkshaganum sambært § 5, stk. 3 í elveitingarlógini.

Í staðin kann Orka fremja eitt § 5, stk. 2 útboð í samsvari við annan av omanfyri nevndu møguleikunum og og harvið skapa møguleikar fyri, at øll áhugað kunnu koma við boðum.

Um talan t.d. er um eitt § 5, stk. 2 útboð við staðseting á Bøllureyni í Flatnahaga (12 MW) og Eiði (6MW), kann útboðið eisini skipast soleiðis, at til ber at bjóða við aðrari staðseting soleiðis, at t.d. Vindrøkt kann lata inn tilboð við teirra verkætlan á Gellingarkletti.

Vísandi til omanfyri nevnda bræv okkara frá 9. mai 2019 heita vit <u>í øðrum lagi</u> á Orku um at útseta settu freistina fyri at lata inn tilboð til 1. oktober 2019 soleiðis, at møguleiki er hjá SEV at fáa greiðu á teimum viðurskiftunum, sum eru framførd í áður nevnda brævi okkara frá 9. mai 2019, samstundis sum SEV kann fáa gjørt tilboð uppá teir tveir møguleikarnar, ið eru nevndir omanfyri, nevniliga Flatnahagi/Hoyvíkshagi og Flatnahagi/Eiði.

Sum kunnugt er lýsta freistin at lata inn tilboð grundað á sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum sett til 14. juni 2019. Vísandi hertil loyva vit okkum at biðja tykkum um at svara hesum skrivi alt fyri eitt. Somuleiðis loyva vit okkum at minna á, at tit framvegis ikki hava svarað skrivi okkara frá 9. mai 2019.

./.  Avrit av hesum skrivi er sent Heilsu- og Innlendismálaráðunum, Fiskimálaráðnum og Kommunufelagnum til kunningar.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV

John Zachariassen
nevndarformaður

/

Hákun Djurhuus
stjóri

umhvørvisstovan

SEV
Tórshavn

Att.: John Zachariassen, nevndarformaður
Hákun Djurhuus, stjóri

Argir, 20. mai 2019
Málsnr.:19/00349
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ari Johanneson

móttikið
22-5-2019 17:01

Viðvíkjandi lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku

Víst verður til skriv tykkara, dagfest 9. mai 2019 viðv. omanfyri nevnda. Eisini verður víst til skriv tykkara 8. apríl 2019 og svarskriv okkara, dagfest 17. apríl 2019 viðv. sama.

Orka hevur hesar ískoytisviðmerkingar til nevnda skriv tykkara.

**Viðv. spurninginum um hvørt aðrir umsøkjarar kunnu søkja í Hoyvíkshaganum ella á øðrum hóskandi øki:**
Vit kunnu endurtaka, at spurningurin/møguleikin stendur opin hjá einumhvørjum, sum er áhugaður at finna hóskandi øki, inn til freistin 14. juni 2019 er runnin.

**Viðv. spurningi tykkara, um at greiða nærri frá at treytirnar verða loknar fyri eitt møguligt seinni útboð og viðv. spurninginum, hvussu ein møgulig sjálvboðin umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku verður viðgjørd:**
Vísandi til § 5, stk. 3 og 4, skal meting gerast um, hvørt umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin verður viðgjørd og skal landsstýrismaðurin ráðføra seg við SEV í hesum sambandi. Tá og um ein møgulig sjálvboðin umsókn kemur t.d. á Sandoynni, so verður hendan viðgjørd sambært §5, stk. 3 og 4. Í tí liggur, at avgerð um møguligt útboð ikki kann takast uttan so at umstøðurnar, eftir eina ítøkiliga meting og eftir ráðføring við SEV, tala fyri, at umsóknin alment kann lýsast.

**Viðv. spurninginum um øll áhugað kunnu søkja á sama stað**
Vit kunnu endurtaka, at Orka sum kunnugt, ígjøgnum longri tíð hevur arbeitt við at útvega atgongd til lendi í Hoyvíkshaganum við tí fyri eyga at lýsa eftir umsøkjarum, sambært § 5, stk. 2 í elveitingarlógini. Tað eydnaðist tó ikki Orku at at fáa atgongd til lendi har.

Sum nevnt áður, fer Orka framhaldandi at arbeiða fyri at bjóða út loyvi til elframleiðslu úr vindorku eftir tí leisti, sum arbeitt hevur verið eftir seinastu árini. T.v.s. hóskandi økir til staðseting av vindmyllulundum verða fyrireikað til útboð í samráð við viðkomandi myndugleikar og harundir SEV og viðkomandi eigarar av lendi.
Hin møguleikin sambært elveitingarlógini er sjálvandi framvegis galdandi, har umsøkjarar kunnu søkja sjálvbodnir.

Ongar ítøkiligar ætlanir eru um at gera broytingar í tí útbjóðingarleisti, sum higartil hevur verið arbeitt eftir, hóast neyðugar tillagingar verða gjørdar, í tann mun tørvur verður á tí.

**Viðv. tykkara viðmerking um, at tað er í stríð við tað, sum ein samd vinnunevnd legði stóra áherðslu á, tá ið § 5, stk. 3 í elveitingarlógini varð samtykt.**
Vit ganga útfrá, at SEV í hesum føri sipar til lógarbroytingina frá 7. Juni 2012, har tað m.a. varð samtykt, at:

***"Stk. 3. Um umsókn er komin um at veita loyvi til framleiðslu úr vindorku, uttan at alment er lýst eftir umsóknum, og landsstýrismaðurin metir, at umstøðurnar og umsóknin tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørd, skal landsstýrismaðurin gera av, at loyvi bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi við eini freist upp á í minsta lagi 60 dagar frá tí, at lýst varð".***

Í álitinum frá Vinnunevndini, skipaði nevndin seg í ein minniluta og ein meiriluta. Tað er ikki rætt, at Vinnunevndin varð samd, sí hjálagt avrit av álitinum. Meirilutin skrivar:

***Meirilutin (Alfred Olsen, Bjarni Djurholm, Hanus Samró, Jógvan Skorheim og Janus Rein) metir tað vera av alstórum týðningi, at útbyggingin av varandi orkukeldum so sum vindi og vatni verður framd so skjótt sum tilber og skjótari og í størri mun enn hesi seinastu árini, bæði fyri at minka um oljunýtsluna og fyri at økja um varandi orkukeldur, so vit kunna røkka tí málinum, vit hava sett okkum sjálvum um at minka CO2 útlátið við 20 % fram til 2020.***

***Núverandi skipan við almennari útbjóðing av vindorkuni hevur víst seg at vera darvandi fyri***
***útbyggingina, og seinasta dømi er útbyggingin av vindorkuni í Nes haga, sum hevur tikið ár, við kærufreistum og sakarmáli, áðrenn farast kundi undir at seta vindmyllur upp til elframleiðsluna nú í heyst, sjálvt um hetta økið var góðkent og var boðið alment út.***
***Fyri at skapa fyritreytir fyri einari skjótari útbygging av vindorkuni, sum í dag er tann einasta orkuútbygging, sum krevur eina almenna útbjóðing, eru uttan iva fleiri møguleikar, har ein møguleiki er at avtaka verandi treyt um, at vindorkuútbygging skal bjóðast út alment, og í staðin lata upp fyri eini smidligari skipan av vindorkuútbyggingini við teirri treyt, at allir aktørar, sum bjóða seg fram til at framleiða vindorku, skulu í øllum førum taka atlit til veitingartrygdina.***
***Aftaná broytingina samsvarar hetta við ta skipan og tær treytir, sum vit hava í verandi kolvetnislóg.***
***Við grundarlagi í hesum setir meirilutin fram soljóðandi.....***

Til nr. 2 viðmerkir meirilutin m.a. at:

***Tá ið ein umsókn um loyvi at framleiða el úr vindorku kemur inn, skal landsstýrismaðurin gera av, at onnur áhugað eisini kunnu søkja um loyvi á sama stað ella øðrum staði. Á hendan hátt ber til at fáa fleiri ymiskar umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og sostatt tryggja kapping og teir fyrimunir, sum kapping førir við sær.***

Sambært omanfyri nevnda er tað ein møguleiki, at søkjast kann um loyvi á sama stað ella øðrum staði, og møguleikin er sostatt til staðar í hesum føri fyri at fleiri ymiskir umsøkjarar kunnu søkja. Men ikki fyrr enn freistin at søkja, 14. juni, er farin, ber til at staðfesta, hvørt fleiri

umhvørvisstovan

umsøkjarar eru, og tá verður endalig støða tikin til, hvørt grundarlag er fyri at veita eitt loyvi ella ikki.

Við hesum útboðnum, sum er grundað á eina sjálvbodna umsókn, eru møguleikar fyri, at fleiri umsøkjarar kunnu søkja. Tað kann fyri góðan ordans skuld viðmerkjast, at tað ongastaðni í elveitingarlógini er ásett, at tað skal verða kapping, men umvegis útboð skal møguleikin verða til staðar, tá ið loyvi verða boðin út. Og møguleikin er til staðar í hesum førinum.

Viðv. tykkara viðmerking um, hvørt Orka er ført fyri at meta um prísurin er kappingarførur, so er júst vindorkuøkið tað økið, har best ber til at samanlíkna (benchmarka) elprísin. Sjálvandi eru fortreytirnar ikki eins fyri tær ymsu vindmyllulundirnar, men júst hetta økið er tað økið, ið best samanlíkningargrundarlag er fyri.

Orka hevur sostatt gott grundarlag fyri at meta um, hvat ein hóskandi elprísur er fyri eitt nú eina komandi vindmyllulund í Hoyvíkshaganum. Inntil nú eru 5 vindmyllulundir, sum kunnu nýtast sum samanlíkningargrundarlag. Sum nevnt kunnu fortreytirnar sjálvsagt verða ymiskar frá staði til stað, t.d. vindviðurskifti, atgongd til lendi, stødd á myllum v.m. Men tað ber væl til at korrigera fyri tey frávik, ið eru frá vindmyllulund til vindmyllund, og harútfrá finna ein samanlíkningarprís.

Skoytast kann uppí, at milliarda íløgur standa fyri framman innan elveitingarøkið. Hetta í sambandi við eitt nú neyðugar útbyggingar/dagføringar av elnetinum, pumpuskipan í Vestmanna og møguliga pumpuskipan í Suðuroy, og eisini komandi sólorkuskipanir. Júst í hesum døgum verður nýtt Sundsverk liðugt bygt, sum væntandi fer at kosta millum 700 og 800 mió. kr.

Í ongum av teimum nevndu førunum verða loyvi boðin út frammanundan, hvørki á netsíðuni, heldur ikki, tá ið t.d. avgerð varð tikin um, at byggja nýtt Sundsverk.

Sum nevnt er vindorkuøkið einasta virkisøki har loyvini verða boðin út alment við fullum gjøgumskygni, og virksemið verður harumframt rikið í sjálvstøðugum partafeløgum, við sjálvstøðugum almennum roknskapum.

Sæð frá einum kappingar sjónarmiði kundi møguleikin verið umhugsaður at bjóða øll loyvi út í fría kapping til eitt nú sólorkuskipanir, eins og teir partarnar av pumupskipanunum, ið krevja framleiðsluloyvi sambært elveitingarlógini. Onki er í elveitingarlógini, sum forðar fyri at hesi økini eisini verða kappingarútsett, eins og vindorkuøkið er.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at vit meta ikki orsøk verða fyri at ganga áheitan tykkara á møti um at taka upp aftur viðgerðina av spurninginum um, hvørt sjálvbodna umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt eigur at verða viðgjørd sambært § 5, stk. 3.

Viðvíkjandi áheitan tykkara um at útseta freistina fyri innlating av tilboði, verður sagt frá, at um vit fáa eina ítøkiliga umsókn/áheitan um at útseta freistina, grundað á at arbeitt verður við at fyrireika ítøkiliga umsókn, sambært hesum útboðnum, vilja vit viðgera eina tílíka umsókn.

Við hesum viðmerkingum meta vit at hava svarað spurningum tykkara.

Viðvíkjandi áheitan tykkara um skjalainnlit verður sent tykkum skjalayvirlit frá hesum málum:

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

umhvørvisstovan

- Journal nr. 19/00273 - Umsókn frá Vindrøkt um loyvi til elframleiðslu úr vindorku við Gellingarklett í Hoyvíkshaganum
- Journal nr. 19/00349 - Viðmerkingar frá SEV til Útboð av open door umsókn í Hoyvíkshaganum
- Journal nr. 17/00585 - Samskifti við Búnaðarstovuna um lendi til vindmyllur í Hoyvíkshaganum
- Journal nr. 17/00208 - Samskifti við Sigert Patursson um øki til vindmyllur í Hoyvíkshaganum
- Journal nr. 19/00462 – Gjald fyri lendi til vindmyllur
- Journal nr. 16/00490 – Lendisskipan til vindmyllur

Heitt verður á tykkum um at eyðmerkja tey skjøl tit ynskja innlit í. Viðmerkjast kann, at innanhýsis fundarfrágreiðingar og innanhýsis upprit í útgangsstøðinum ikki eru fevnd av almennum innliti, sambært § 7 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Tó kunnu vit geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.

Vísandi til § 4., stk. 3, í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina skal áheitan um innlit skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við. Í tykkara føri verður biðið um:

- øll skjøl viðv. atgongd til lendi í Hoyvíkshaganum,
- øll skjøl viðv. framferðarhátti/mannagongd í sambandi við lýsing eftir umsøkjarum
- øll skjøl í sambandi við útboðið í Hoyvíkshaganum.

Av tí, at tit ikki ítøkiliga skila tey skjøl og mál, ið innlit ynskist í, verður fyrivarni tikið fyri, at ikki onnur skjøl kunnu finnast enn tey skjøl, sum eru í omanfyri nevndu málum.

Eru spurningar ella ivamál eru tit vælkomin at venda aftur til okkara.

Vinarliga

Petur Nielsen
Stjóri

/Ari Johanneson
ráðgevi

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

Umhvørvisstovan
Orka
Postboks 2048
FO-165 Argir

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

23. mai 2019


Att.: Petur Nielsen, stjóri / Ari Johanneson, ráðgevi

**Viðv. tykkara málnr. 19/00349: Lýsing eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku.**

Víst verður til bræv tykkara dagfest 20. mai 2019, sum vit fingu sendandi umvegis teldupost seint í gjár.

Fyrst av øllum skulu vit biðja um innlit í øll skjøl, sum framganga av skjalayvirlitunum, sum tit hava sent okkum.

Vísandi til fyrivarni tykkara um, at onnur skjøl kunnu finnast um tey viðurskifti, sum vit hava biðið um innlit í, loyva vit okkum harnæst at biðja um innlit í málsyvirlitið í journalskipanini hjá Orku fyri 2018 og 2019.

Vit venda aftur til málið, tá ið vit hava fingið innlit í omanfyri nevndu skjøl. Vit skulu tó fyribils gera hesar viðmerkingar til ein part av innihaldinum í skrivi tykkara.

Vit standa heldur spyrjandi yvirfyri endurtøku tykkara av, at "*spurningurin/møguleikin stendur opin hjá einumhvørjum, sum er áhugaður at finna hóskandi øki, inn til freistin 14. juni 2019 er runnin*" tá tit vita, at økið við Gellingarklett í Hoyvíkshaganum inntil nú ikki hevur verið atkomuligt hjá øðrum enn umsøkjaranum sjálvum, og at tað mest sannlíkt ikki er møguligt hjá øðrum at lata inn umsókn við aðrari staðseting til nevndu freist.

Viðvíkjandi spurninginum um hvussu ein møgulig seinri sjálvboðin umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku verður viðgjørd, siga tit, at avgerð um møguligt útboð ikki kann takast uttan so, at umstøðurnar, eftir eina ítøkiliga meting (og eftir ráðføring við SEV), tala fyri, at umsóknin alment kann lýsast.

Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

Tit svara tó ikki áheitanina um at grundgeva fyri avgerðini um, at umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt skuldi viðgerast, herundir upplýsa hvørjar "umstøðurnar" eru, sum eftir metingini hjá Orku tala fyri hesum og fyri at lýst skal vera eftir umsøkjarum til loyvi til elframleiðslu úr vindorku í Hoyvíkshaganum ella á øðrum hóskandi staði við støði í nevndu umsókn. Hetta hóast tað inntil nú ikki hevur verið gjørligt hjá øðrum enn umsøkjaranum sjálvum at fingið loyvi at seta upp vindmyllur í Hoyvíkshaganum, og hóast Orka ikki hevur kannað, hvørt tað er møguligt at lata inn umsókn við aðrari staðseting.

Tað er rætt, at tá ið § 5, stk. 3 í elveitingarlógini varð samtykt, skipaði vinnunevndin seg í ein minniluta og ein meiriluta. Men bæði minnilutin og meirilutin vóru samd um, at leggja stóra áherðslu á kapping, og at landsstýrismaðurin í sambandi við sjálvbodna umsókn "skal" lýsa eftir umsøkjarum soleiðis, at onnur áhugað kunnu søkja.

Meirilutin sigur m.a. í viðmerkingunum, at "*Tá ið ein umsókn um loyvi at framleiða el úr vindorku kemur inn, skal landsstýrismaðurin gera av, at onnur áhugað eisini kunnu søkja um loyvi á sama stað ella øðrum staði. Á hendan hátt ber til at fáa fleiri ymiskar umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og sostatt tryggja kapping og teir fyrimunir, sum kapping førir við sær.*" (okkara undirstriking)

Minnilutin sigur m.a., at "*Hetta merkir sostatt, at landsstýrismaðurin ger fullkomuliga sum hann vil, og tað verður sostatt ikki eitt krav, at tryggjast skal opinleiki fyri møguligari kapping í sambandi við allar útbyggingar. Hetta er beinleiðis at undirgrava aðaltankan um kapping í elveitingar-lógini fyri at fáa bíligastu og bestu útbyggingarnar, sum geva lægst møguligan prís fyri brúkaran. Hesum tekur minnilutin als ikki undir við.*

*Henda orðing má broytast til "skal", skal ásetingin geva nakra meining.*"

Av viðmerkingunum omanfyri hjá meirilutanum sæst, at endamálið við ásetingini er "*at fáa fleiri ymiskar umsøkjarar til eitt ávíst loyvi og sostatt tryggja kapping og teir fyrimunir, sum kapping førir við sær.*"

Um so er, at tað frammanundan er greitt, at eingin annar enn umsøkjarin, sum hevur latið umsókn inn sambært § 5, stk. 3, hevur møguleika at lata umsókn inn, er slíkt útboð ikki í samsvari við omanfyri nevnda endamál.

Hóast Orka sigur seg hava eitt gott grundarlag fyri at meta um, hvat ein hóskandi elprísur er fyri eitt nú eina komandi vindmyllulynd í Hoyvíkshaganum, er greitt, at Orka ikki hevur møguleika fyri at meta um, hvørji tilboð verða latin inn, um fleiri hava møguleika at bjóða. Eisini er greitt, at Orka ikki sambært elvetingarlógini hevur heimild at skipa fyri

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00

einum § 5, stk. 3 útboði, har tað frammanundan er greitt, at eingin annar enn umsøkjarin sjálvur hevur møguleika at bjóða.

Líka so greitt tað er, at Orka ikki sambært elveitingarlógini hevur heimild at skipa fyri einum § 5, stk. 3 útboði, har tað frammanundan er greitt, at eingin annar enn umsøkjarin sjálvur hevur møguleika at bjóða, líka so ógreitt er tað, hvør orsøkin er til, at Orka undir verandi umstøðum avgerð at fara undir eitt slíkt útboð.

Tit boða frá, at tit meta ikki orsøk vera fyri at ganga áheitanini frá SEV á møti um at taka upp aftur viðgerðina av spurninginum um, hvørt sjálvbodna umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt eigur at verða viðgjørd sambært § 5, stk. 3. Sum nevnt omanfyri verður í skrivi tykkara ikki grundgivið fyri avgerðini um, at umsóknin hjá Sp/f Vindrøkt upprunaliga skuldi viðgerast, herundir hvørjar "umstøðurnar" eru, sum eftir metingini hjá Orku tala fyri hesum. Enn minni verður grundgivið fyri, hví tit ikki meta orsøk vera fyri at taka upp aftur viðgerðina.

Eisini boða tit frá, at um tit fáa eina ítøkiliga umsókn/áheitan um at útseta freistina, grundað á at arbeitt verður við at fyrireika ítøkiliga umsókn, sambært útboðnum grundað á sjálvbodnu umsóknina hjá Sp/f Vindrøkt í Hoyvíkshaganum, vilja tit viðgera eina tílíka umsókn.

Í skrivi, sum SEV sendi Orku umvegis teldupost í gjár aftaná døgurða varð m.a. heitt á Orku um at útseta freistina fyri at lata inn tilboð til 1. oktober 2019. Umframt tað, sum longu er ført fram í skrivi okkara frá 9. mai 2019 viðvíkjandi Hoyvíkshaganum v.m., er í skrivinum frá í gjár m.a. eisini víst á aðrar ítøkiligar umsóknir, sum SEV arbeiðir við. SEV hevur tó brúk fyri longri tíð at arbeiða við málinum. Vísandi hertil loyva vit okkum at biðja tykkum um beinanvegin at svara áheitanina um at útseta freistina fyri at lata inn tilboð til 1. oktober 2019.

Avrit av hesum skrivi er sent Heilsu- og Innlendismálaráðnum,
./. Fiskimálaráðnum og Kommunufelagnum til kunningar.

Vinalig Heilsan
Elfelagið SEV

John Zachariassen, / Hákun Djurhuus,
nevndarformaður stjóri

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo



Vestmanna:
+298 34 68 00

Klaksvík:
+298 34 68 00

Vágur:
+298 34 68 00